## Venus vunnið næstan 15 milliónir krónur

Venus kom á Sørvág seinnapartin í dag, teir hava roynt á Rygginum og hava um 40 tons inni. Venus landar til Landingarmiðstøðina í Sørvági í morgin, teir hava 30 tons av toski, 3 tons av blálongu, 3 tons av svartkalva og 4 tons av ymiskum fiskasløgum, Venus byrjaði túrin 5. desembur. Árið hevur roynst væl hjá Venus, teir hava fiskað umleið 950 tons, sum eru seld fyri knappar 15 milliónir. Reiðarin Hálvdan Gudmundsen er vælnøgdur, hann heldur, at Venus er millum teir frægastu línubátarnar aftur í ár. Venus kemur at liggja um jólahalguna, teir fara ikki nýggjan túr fyrrenn eftir nýggjár.



# Tjóðveldi borðreiðir við sterkum lúti í Løgtinginum

**Fíggjarnevndarlimirnir hjá Tjóðveldi vilja hava bæði tilfeingisgjald og grønan skatt, umframt at tey vælbjargaðu skulu gjalda meiri í skatti. Samstunds vil flokkurin avtaka sjómannafrádráttin, umframt at rentustuðulin og danska ríkisveitingin skulu lækkast**

FÍGGJARLÓGIN
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tjóðveldi leggur fleiri umstrídd uppskot fyri Løgtingið fyri at fáa samfelagið aftur á beina kós, sum flokkurin málber seg*

Tað skulu heilt alvorlig tiltøk setast í verk, so at Føroyar koma sterkari og burturúr kreppuni, sum rakar okkum.

Tað heldur Tjóðveldi, nú Løgtingið fer undir endaligu viðgerðina av fíggjarlógini fyri næsta ár.

Tí hevur flokkurin lagt eina røð av uppskotum fyri Løgtingið, sum skulu fáa Føroyar aftur á beina kós.

Samanumtikið mælir flokkurin til at seta sparingar í verk, sum tilsamans geva landskassanum 242 milliónir í inntøkum afturat.

Men harafturat mælir flokkurin til at seta tiltøk í verk, sum fara at kosta 136 milliónir.

Sostatt ætlar Tjóðveldi at spara tilsamans 106 milliónir.

### Sterkur lúkur

Og tað er ikki hissini kostur, Tjóðveldi borðreiðir við.

Í hesum sambandi vilja Annita á Fríðriksmørk og Tórbjørn Jacobsen hava Løgtingið at áseta fiskivinnuni eitt tilfeingisgjald upp á 40 milliónir krónur næsta ár.

Tilfeingisgjaldið skal verða 10-15 oyru í miðal fyri hvørt kilo av fiski.

Men føroyingar skulu eisini betala 25 milliónir í grønum skatti, ella CO2-avgjaldi.

Her skal talan vera um eitt avgjald upp á 50 oyru upp á hvønn litur av bensini ella diesel.

Harumframt skulu tær hægri inntøkurnar fáa eina skattahækking upp á 40 milliónir krónur.

Samstundis skal sjómannaskatturin takast av og tað fer at geva landskassanum 60 milliónir krónur meiri í eykainntøkum.

Inntøkutrygdin hjá fiskimonnum skal avtakast og flytast yvir í ALS og tað fer at spara landskassanum 28 milliónir næsta ár.

Eisini vil Tjóðveldi hava, at rentustuðulin verður lækkaður, so at landskassin fær 11 milliónir meiri í inntøkum.

Rentustuðulin skal í fyrsta lagi verða óbroyttir fyri hús, sum eru bygd ella keypt, men avdráttartíðin skal vera í mesta lagi 15 ár.

Men hjá øllum húsum, sum hereftir verða keypt ella bygt, skal rentustuðulin minka 4% um árið, so at hann er burtur um 10-15 ár.

Tjóðveldi vil eisini taka 15 milliónir av yvirskotsfænum í Búnaðargrunninum.

Fyri at nevna nakrar smærri upphæddir, vil Tjóðveldi útvega landskassanum fimm milliónir í inntøkum við at hækka arvavgjaldið.

Tjóðveldi mælir eisini til at strika játtanina til Sandoyartunnilin næsta ár, tí flokkurin metir ikki, at samgongan í veruleikanum ongar ætlanir hevur um at fara undir tunnilin kortini. Næsta ár er ætlanin at seta tvær milliónir av til at fyrireika Sandoyartunnil, men Tjóðveldi vil heldur brúka tann peningin til eina nýggja ítróttarhøll í Sandoy.

Flokkurin vil eisini spara 100.000 krónur við at avtaka stuðulin til Pro Vita

### Ríkisveitingin lækkast

Eisini onnur ting verða nevnd, og tilsamans geva hesar inntøkur 242 mió. krónur í eykainntøkum.

Hinvegin vil Tjóðveldi lækka donsku ríkisveitingina 77 milliónir og seta 10 milliónir av til at fara undir eitt nýtt havrannsóknarskip.

Annars mælir flokkurin til at brúka størri og smærri játtanir til menningarætlan fyri Fróðskaparsetur Føroya, við serligum atliti at eini nýggjari journalistútbúgving, til at geva búskaparráðnum nøktandi arbeiðsumstøður, til serligar fiskivinnuroyndir, til veðurlagsgransking, aliroyndir, granskingargrunn og mentanargrunn, sendistovu í Moskva.

Samstundis skal lívgast um Tjóðpallurin, musikkskúlan landsliðsítrótt.

Flokkurin er eisini ímóti at játtanin til dagtilaldini varð tikin av og at stuðulin til heilivág er minkaður, fyri at nevna nøkur dømi.

## Stýrið ikki við í uppsøgnum

Í greinini í blaðnum í gjár um uppsagnir í Kringvarpinum er ein orðing komið skeivt fyri.

Har er stjórin í Kringvarpinum endurgivin fyri at siga, at tey uppsøgdu eru "tey, sum vit í leiðslu og nevnd eru samd um at siga upp".

Hetta er ikki rætt, tí í starvsskipanini fyri Kringvarpið stendur, at " Stjórin setir og loysir úr starvi starvsfólk. Skal varastjóri setast at virka í stjórans stað, við ábyrgd og heimildum stjórans mótvegis stýrinum, skal stýrið staðfesta slíka setan. "

Hesa skipanina hevur Kringvarpið hildið seg til og tí vitsti stýrið fyri Kringvarpið ikki, hvørji starvfólk vóru uppsøgd, fyrrenn tað kom alment fram.

**-blaðm**